## DAGSINS MEINING

# Konservativur valsigur

Amerikanski forsetin George Bush stendur sterkari eftir miðvalið til kongressina týsdagin. Republikanski flokkurin økti meirilutan í Umboðsmannatinginum, sum er annað kamarið, og harafturat er tað helst eydnast republkanska flokkinum at fá meiriluta í Senatinum, sum er fyrsta kamarið í kongressini, ella samveldistinginum.

Um endaliga úrslitið verður hetta, sum higartil er frætt úr USA, so er George Bush tann triði forsetin, sum er komin styrktur frá einum miðvali - tað er kongressvalið miðskeiðis í forsetavalskeiðnum. Hinir eru Franklin D. Roosvelt og Bill Clinton. Og hann er bara triði forsetin, sum hevur varðveit meirilutan í Umboðsmannatinginum. Hinir eru Eisenhover og Reagan

Úrslitið á amerikanska valinum merkir, at amerikanski forstein kann fremja sín politikk í verki uttan stórvegis mótstøðu. Eygleiðarar rokna tí við, at eitt kríggj móti Irak nærkast. USA kann virka meira sannførandi í samskiftinum við onnur lond - t.d. við sínar sameindu í Evropa - eftir sigurin, og lata eitt hánt um eitt møguligt veto í trygdarráðnum í ST.

Innanríkispolitiskt kann amerikanska stjórnin seta skattalættar í verk fyri tey vælbjargaðu, sum George Bush lovaði í valstríðnum fyri tveimum árum síðani. Harafturat kann stuðla teimum privatu skúlunum og loyva oljuvinnuni at virka í økjunum, sum hava eitt viðbrekið umhvørvi. Hesum hava demokratarnir higartil forðað fyri.

Eisini kann hann tilnevna fleiri dómarar, sum demokratarnir hava kunnað forðað higartil. Serliga verður hugsað um dómararnar til hægstarætt, sum verða valdir fyri lívið og ávirka politikk og samfelagslívið langt eftir at forsetaskeiðið er runnið.

V.ø.o. hevur George Bush vunnið eitt ógvuliga týdningarmikið valstríð fyri republikanska flokkin og tann konservativa partin av USA. Hetta var ikki væntandi miðskeiðis sísða ár, tá forsetin stóð seg illa, og tann viknandi búskapurin skapri trupulleikar. Men forsetin hevur ment støðu sína eftir 11. september, m.a. í stríðnum í mótialtjóða yvirgangi. Hetta evnið evur verið nógv frammi í valstríðnum, men tað hevur snúð seg meiri um innnlendsku trygdina, siga eygleiðarar úr USA.

Hetta hevur verið gott valagn, og veljarar hava heldur gloypt tí enn ávaringunum hjá demokratunum um tann vánaliga búskapin. Demokratiski flokkurin hevur ikki megnað at reka eitt sannføradni valstríð, eins og republikanarnir hava gjørt.Tað er óivað ein orsøk til at republikanarnir øktu meirilutan í umboðsmannatinginum úr 223 upp í 226 tinglimir av teimum 435 limunum og helst fáa meirlutan í Senatinum, har flokkarnir frammaundan høvdu eins nógvar senatorar, 49.

Samanumtikið vunnu teir konservativu republikanarnir, og tað kann skapa størri sosiala ójavnvág í USA, har støðan frammanundan ikki er góð hjá amerikanska undirklassanum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Norðoya Sambandsfelag:

# Eftirlýsir orðaskifti um Fólkaskúlarnar í Klaksvík

**Norðoya Sambandsfelag**
*Erika Elttør,*
*Betta Joensen,*
*John William Joensen,*
*Manni Høgnesen,*
*Poul Juul Vilhelmsen*

Fólkaskúlarnir í Klaksvík eru hart sperdir og hava alt ov leingi verið raðfestir aftarlaga.

Tí eru nógvir átrokandi trupuleikar, sum tað skulla finnast loysnir upp á.

Vit vilja gera vart við at vit ígjøgnum umboð okkara í býráðnum stuðla øllum ætlanum sum kunnu verða við til at betra um viðurskiftini hjá skúlunum.

**Ósáskúlin**
hevur hart brúk fyri fleiri stovum, og tí tekur Norðoya Sambandsfelag undir við teimum útbyggingarætlanum sum Klaksvíkar Býrað arbeiðir við í løtuni. Men vit gera vart við at felagið metir at hesar útbyggingar neyvan koma at nøkt framtíðar tørvin hjá skúlanum.

**Skúlin á Ziskatrøð**
Norðoya Sambandsfelag harmast um at ongar umvælingar vóru gjørdar á Skúlan á Ziskatrøð í ár. Vit harmast um at annað arbeiði bleiv tikið framm um skúlan. Samstundis fegnast vit um at býráði hevur sett tilsamans 5 milliónir av á fíggjarætlanini fyri komandi ár.

**Orðaskiftið um Fólkaskúlan**
Norðoya Sambandsfelag eftirlýsir einum orðaskiftið um Fólkaskúlarnar í Klaksvík og hvussu teir skulu síggja út í framtíðini.

Eitt broytt orðaskiftið um Fólaskúlan í Klaksvík, er alneyðugt, um vit skulu verða framman fyri vøksturin í fólkatalinum og tað menning í samfelagnum, sum ein undirsjóartunnil um Leirvíksfjørð uttan iva fer at hava við sær.

# Serviðgerð á Ríkishospitalinum v.m.

**Heri Mohr**



Í gjárkvøldið (05.11.02) sóu/hoyrdu vit samrøður í Degi og Viku fyrst við ein pápa, Gunnar Dahl-Olsen, sum hevur tvey smá børn, ið krevja serliga viðgerð á Ríkishospitalinum nakrar ferðir um árið, og so við landsstýrismannin við heilsumálum, Bill Justinussen, sum greiddi okkum frá, at hesi smáu børn ikki kunnu fáa ta neyðugu serviðgerð á Ríkishospitalinum fyrr enn einaferð í 2003, tí eingir pengar vóru í landskassanum – játtanin er uppbrúkt!

Havandi í huga, at **øll sjúkrahúsviðgerð á Ríkishospitalinum er kostnaðarleys fyri føroysku sjúkrahúsini, og at pengarnir til slíkar sjúkraviðgerðir eru (enn) í heildarveitingini frá ríkiskassanum,** er her neyðugt at vísa til fólkatingslóg nr. 621 frá 22. desember 1976 fyri Føroyar, har undir § 5 m.a. er tilskilað: »Sygehusenes overlæger har ret og pligt til at yde bistand og modtage bistand fra de øvrige sygehuse og ret til at senda patienter til behandling på sygehuse i Danmark. Nærmere regler herom fastsættes i det af landsstyret udfærdigede reglement for det færøske sygehusvæsen«.

Og til landsstýrisins kunngerð nr. 70 frá 6. oktober 1977, har m.a. er tilskilað: »Sjúklingurin verður kannaður til viðgerð á donskum sjúkrahúsi ella deild v.m., ið verður rikin ella goldin av statinum, av praktiskum orsøkum helst Rigshospitalet. Viðgerðin á niðan fyri nevndu sjúkrahúsum og deildum er eftir avtalu við ríkisstýrið **kostnaðarleyst fyri føroyska sjúkrahúsini** (undirstrikað av HM): Rigshospitalet herundir Kysthospitalet på Refsnæs, Ortopædisk Hospital í Keypmannahavn, Finseninstitut, herundir Radiumstationen. Bert í teimum førum, har tað er heilt greitt, at sjúklingurin ikki kann viðgerast á teimum undir punkt 2 nevndu sjúkrahúsum og deildum, skal sjúklingurin kannast til onnur sjúkrahús t.d. Andelsforeningens Gikthospital í Skelskør og Afholdsbevægelsens Behandlingsinstitutter for alkoholskadede«.

Um lógin frá 1976 og landstýrisins kunngerð frá 1977 framvegis eru í gildi, og um tað, sum vit hoyrdu og sóu hetta kvøldið í SvF er eftirfarandi, so hevur spurningurin, um læknafelagið ikki eigur at stevna landsstýrismannin fyri heilsumálum fyri álvarsligt brot ímóti lógfestum mannarættindum, tikið seg upp.

# Sparingar

**Grímur Jacobsen**

Hendan klandurssamgongan leitar eftir sparingum. Teir vilja steðga arbeiðum, har láglønt fólk arbeiðir.

Eitt hugskot er. Landsstýrismenn og kvinnur við aðalstjórum fara í 3 mánaðir feriu uttan løn.

Tey koma ikki í fíggjarkreppu av teirri orsøk.

Tá er nógv sparing. Og eingin skaði hendur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Summardekk/vetrardekk

**Bjarni Reynagarð**
*Tórshavn*

Hvørt ár um oktober/november, tá myrkur, hálka og kavi aftur gerast gerandiskostur, er ofta sama samrøðuevni: Hvat er best? Summardekk, heilársdekk, píkadekk ella lamelldekk? Í útvarpinum nú ein dagin var hetta evnið umrøtt og viðgjørt í »Fimmaranum« millum menn í útvarpsstovuni, og av fólki sum ringdu inn. Tað var bæði forvitnisligt og stuttligt at lurta eftir hesum fólkum – har hvør í sínum lagi sjálvandi helt seg hava rætt!

Eg skal tó ikki gera meg serkønan á økinum, men skal bert gera nakrar viðmerkingar. Lat okkum sláa fast, at summardekk eru best á bæði turrum og vátum asfalti – eingin ivi um tað! Tað er heldur eingin ivi um, at á ísi eru píkadekk nógv best. Lamelldekk eru eitt kompromis ímillum summardekk og píkadekk, sum hava nakrar av eginleikunum hjá hinum báðum dekkunum, men ikki allar!

Treytin fyri at koma fram í øllum góðum í bili er umhugsni og ansni í ferðsluni. Men serliga um veturin eru avleiðingarnar av mistøkum hesum viðvíkjandi kostnaðarmiklar, likamliga og materielt. Og tá so er, er tað jú ofta líkamikið, hvat slag av dekkum eru undir bilinum. Hugsa um, at hvørt dekkið bert er sum ein hondflata til støddar, har tað hevur samband við vegin. Tað sigur seg sjálvt, at hetta ikki er nógv, og viðhvørt er hetta ikki nóg mikið í hálku, tá ferðin eisini ávirkar negativt, og sostatt økir um vandan fyri mistøkum, serliga tá ein bilur vigar eitt tons ella meira.

Tað er heldur ikki líkamikið, hvørji hjól ein bilur trekkjur við í hálku, framman ella aftan. Speedar ein ov nógv upp við einum framhjólstrektum bili, hendir bert tað, at hann spolar. Men ger ein tað sama við einum bakhjólstrektum bili, er tað ikki so einfalt, tí tá kann tað henda, at »reyvin yvirhálar gronina«, og tað er als ikki spennandi, men harafturímóti sera vandamikið!

Tað er gamalt at siga, at tað er »eggið undir høgra fóti«, sum avger, hvussu atburður í ferðsluni eydnast. Um ein altíð traðkar á bremsu- ella speedarapedalina, eins og eitt egg liggur millum fót og pedal, so kann tað ikki ganga heilt galið í hálku. Tá ein arbeiðir so mjúkt og bleytt sum tilber við bilinum, forðar hetta samstundis fyri, at hesin glíður, tá ein antin bremsar ella fer avstað. Tað er soleiðis ikki altíð dekkið, sum avger munin, men heldur atburðurin undir ymiskum umstøðum.

Hvussu nógvar dagar árliga hevur ein veruliga tørv á serligum vetrardekkum? Hóast veðrið er sera skiftandi og svikaligt, er tað neyvan hálka í meira enn í meðal 30-40 dagar allan veturin og ofta er tað bert hált um morgunin og so aftur um kvøldið, meðan tátt er um dagin.

Hvørji dekk fólk skulu koyra við um veturin, eri eg ikki førur fyri at avgera. Frægast man vera, at lata ein og hvønn ráða sær eftir samvitsku og egnum royndum. Men kanska áttu dekksølurnar at kunna enn betur um tey ymisku dekksløgini – fyrimunir og vansar. Teir veita sjálvandi tað slagið, kundin ynskir, men helst uttan at spyrja nóg gjølla um, hvar og hvat tørvurin í veruleikanum er. Kundin veit tað kanska ikki, og kennir bert eitt ávíst dekk – tí tað slagið hevur grannin! Lat okkum hyggja at teimum ymisku dekksløgunum.

Summardekk: Hesi geva best samband við vegin undir øllum vanligum umstøðum, men eru ikki eins góð til hálku. Tey hava harðari gummi, sum gevur bestu koyrieginleikar og tey hava nógv stytst bremsulongd. So leingin eingin kavi ella ísur er á vegnum, eru hesi klárt nummar eitt. Tað verður tó sagt um summardekk, at tey ikki eru góð í kulda niðan fyri 7 stig selsius, men hetta tykist ikki at hava hald í veruleikanum. Ein vansi er við breiðum summardekkum, at tey eru ónýtilig og vandamikil í hálku. Tey eru gjørd júst til nógva ferð á motorvegum einki annað!

Heilárdekk: Hesi eru heilt grovmynstrað dekk, sum kunnu brúkast bæði summar og vetur, harav navnið. Tey roynast best í kava, men geva helst ikki eins góðar eginleikar sum píkadekk og lamelldekk í hálku. Tey nøkta tí neyvan allan tørv til vetrarkoyring – men møguliga fari eg skeivur?

Píkadekk: Hesi eru nógv tey bestu dekkini á ísi og hálku, og tey eru eisini góð í kava, men tey eru at kalla vandamikil á vanligum turrum ella vátum vegi, tí tá hava tey eina bremsulongd uppá kanska tað dupulta av summardekkum og vegsambandið er lítið og einki – tað eru næsta bert píkarnir, sum nerta vegin! Píkadekk eru tí als ikki egnað til koyring við nógvari ferð, tí tá eru tey sera ótrygg. Píkadekk geva ofta eina falska trygd hjá fólki, sum ikki eru nóg køn í hálkukoyring! Hugburðurin tykist at vera, at tá ein hevur píkadekk, so kann ein koyra sum einum lystir, men hetta samsvarar als ikki við veruleikan! Eisini slíta píkarnir tað kostnaðarmikla asfaltið órímiliga nógv, samstundis sum tað gerst eitt øgiligt svínarí á øllum vegum. Ein vansi, sum vit øll líða undir og gjalda fyri!

Lamelldekk: Tey eru eitt millumting ímillum summardekk og píkadekk. Tey eru serliga gjørd til turran og vátan kava, og tey eru eisini rímuliga góð á ísi – men ikki eins góð og píkadekk! Tey eru góð til bæði turt og vátt asfalt, men eru av bleytari gummi, sum ávirkar, at tey ikki hava eins góðar koyrieginleikar ella eins stutta bremsilongd sum summardekk í slíkum føri – men tey hava tó nógv stytri bremsilongd enn píkadekk! Ein annar fyrimunur er eisini, at tey ikki geva nógv óljóð! Vigar ein fyrimunir og vansar við lamelldekkum mótvegis hinum dekkunum, er tað greitt, at lamelldekkið er eitt sera gott alternativ. Tað klárar ikki alt, men næstan!

Viðmerkjast kann, at eg havi havt bil í næstan 30 ár, men ongantíð píkadekk. Bilurin er altíð vælskøddur við lamelldekkum um veturin, og hetta slagið havi eg brúkt í eini 20 ár. Tey hava tænt mær trygt og væl, og tey hava allar teir eginleikar, mær tørvar. Eg havi annars koyrt nógv við arbeiðsbilum við píkadekkum, men havi ongantíð dámt tey eins væl og lamelldekk.

Til mín tørv eru píkadekk sostatt óneyðug – um veturin er mesta koyringin í Havn – sjálvt um tað kann vera trupult at sleppa niðan á Ternurygg í ringum kavaveðri, til dømis. Men eg skal viðganga, at viðhvørt høvdu píkadekk verið betri, serliga tá hált er sum á kalvabaki, samstundis sum ferðslan tá oftast gerst kaotisk og støðan tí hættislig. Men samanumtikið er ongin orsøk til at brúka píkar til býkoyring í Havn, sum tað verður alt ov nógv gjørt av, og fyri at tálma óneyðuga nýtslu av hesum, eiga myndugleikarnir at umhugsa, at áleggja okkurt avgjald fyri píkadekk.

Men skuldi eg dagliga koyrt um fjøll og skørð, hevði støðan møguliga verið ein onnur, og eg hevði tá kanska umhugsað píkadekk, hóast teir vansar, hesi hava við sær! Men mær hevði dámt hetta stak illa, og bert við ringum tannabiti at liva við ótryggleikanum og óljóðinum frá píkunum í 150 dagar, fyri trygt at vinna á ísi og hálku í aðrar 30 dagar. Tað kann tykjast meiningsleyst!

Myndugleikarnir eiga at taka sær um reiggj og skjótast gjørligt seta tørvandi hálkubreytir á stovn, har ein undir røttum umstøðum kann læra rætta nýtslu av vetrardekkum – til frama fyri øll í vetrarferðsluni! At enda: Minst til, at »fram kemur tann, ið hóvliga fer«!

# Seyðasýning – Fjallmannaveitsla

*Føroyingar, sum her nú koma saman.*

Fjøllini tey eru nú øll gingin,
hepnast hevur alt so sera væl,
krovini í hjallin eru fingin
tálgin hon í laka saltast skal.
Latum okkum aldri, aldri gloyma,
tað sum fedrar okkum lærdu her,
latum okkum alt tað góða goyma,
:,:sum teir lærdu okkum her í verð.:,:

Brundseyðir nú allir eru sýndir,
virðismeting fingu teir í dag,
mega ei av nøkrum verða týndir;
eru undan ymsum góðum slag.
Prátið gongur væl ímillum manna,
um tann seyð sum grøna bandið fekk,
ja, her má so mangur maður sanna
:,:rættvísi fram um alt annað gekk.:,:

Latum okkum virða hesa mentan,
sum vit fingu okkar' fedrum frá,
hendan arv vit halda vera hentan,
og at teir her eru okkum hjá.
Hugnaligt tað er á fjall at ganga,
gjøgnum líðir og í brøttu skor,
mangur maður má har seyðin fanga,
:,:stíga vilja vit í fedra spor.:,:

Vit nú sita her við frøði, gaman,
njóta góðan mat og fornan sið,
syngja vit í góðum lag tilsaman,
um teir gomlu, okkum lærdu við.
Tað sum her var teirra dýra æra,
var at læra unga ættarlið;
nøgdsemi og duga væl at spara,
:,:var her teirra fremsta mál og mið.:,:

**Kjartan Stakksund**

# Spennandi sjónleikaravikuskifti á Føroya Fólkaháskúla

**TÍÐINDASKRIV**
*frá MáF*

Vikuskiftið 6. -8. desember skipar MáF fyri sjónleikaraskeiði á Føroya Fólkaháskúla.

Skeiðið er ætlað fólki í aldrinum 16 - 25 ár.

Á skeiðnum verður undirvíst í: rødd, rørslu, improvisatión, viewpoints, karakter- og tekstarbeiði.

Arbeitt verður við at menna og styrkja kropp, rødd, hugflog og samspæl, sum eru tey grunnleggjandi amboðini, ein sjónleikari hevur at arbeiða við.

Eisini verður arbeitt við teksti og leikbrotum, sum luttakarnir spæla fyri hvørjum øðrum.

Undirvísarar eru sjónleikararnir Gunnvá Zachariasen og Birita Mohr.

Skeiðið vendir sær til ung, sum hava hug at spæla sjónleik, - roynd sum óroynd.

Skeiðið byrjar fríggjakvøldið 6. des. Kl. 20 og endar seinnapartin sunnudagin 8.des.

Eitt gott høvi at læra, uppliva, flenna og finna nýggjar síður av tær sjálvum.

Kostnaður fyri skeið, uppihald og mat er Kr. 300.

Tilmelding á MáF skrivstovuni: Tlf. 315624 ella í telduposti til maf@maf.fo í seinasta lagi 11.11.2002.

